Hvussu stimbri eg barn mítt at læra at lesa?

Soleiðis verður málið ment:

Barnið byrjar at pjátra við tí eina endamáli at koma í samband við umverðina.
Mál og kenslur eru tætt knýtt. Málið mennist best, tá samskiftið fer fram í jaligum og tryggum umhvørvi.

Málið er grundarlagið undir lesimenningini

Lesið fyri barninum.
Syngið saman og spælið við orð.
Tosið um tað, sum tit gera í gerandisdegnum.
Veljið heldur sjónvarpssendingar við føroyskari talu. Takið t.d. barnaløtur upp.
Rættið ikki barnið, um tað úttalar orð skeivt, men endurtak orðið týðiliga í einum nýggjum setningi.
Nýtið samrøðuna, at gera barnið varðug við bókstavir og ljóð.
Forteljið smáar søgur og lat barnið fortelja tær søgur, sum tað sjálvt finnur uppá.
Ikki avbróta barnið, tá tað fortelur. Takið heldur tráðin upp og spyrjið, soleiðis at samrøðan heldur fram.

-Minst til, tú kanst ikki gera alt hvønn dag, men tú kanst gera okkurt hvønn dag. -

Hví hevur tað týdning at kenna bókstavar?

Eitt barn, sum kennir flestu bókstavirnar, hevur lættari við at læra ljóðini og stava orð, enn børn sum skulu arbeiða við at skyna bókstavirnar, meðan tað
lesur.
Um barnið kennir bókstavirnar væl, kann tað hugsavna seg um bókstavamynstur – hetta er ein lykil til lesingina.
Nøkur orð eru ljóðrøtt, so her eru børn, sum duga bókstavir, før fyri at lesa hesi orð.
Børnini læra at skilja bókstavaraðið, at bókstavir standa fyri ljóðum, sum kunnu gerast til orð, um man setir teir
saman á rættan hátt.

- Tað er ongantíð ov tíðliga at læra bókstavir.-

Hvat lærir barnið, tá tað spæliskrivar?

At tú skrivar frá vinstru til høgru.
At tú byrjar at lesa og skriva ovast í vinstra horni.
At skrift ímyndar talu.
At skrift er bókstavir, orð og tøl, sum svara til ljóðmyndir í taluni.
At skrift eisini kann brúkast til at samskifta við.
At kanna bókstavaljóðini.

Hugskot til foreldur

Spælið við málið

Forteljið og lurtið eftir søgum. Eisini eftir teimum, sum barnið fortelur. Forteljið og lurtið eftir stuttligum søgum. Eisini eftir teimum, sum barnið fortelur. Lærið rím og ramsur og finnið upp á sjálvi. Spælið við ljóðum og bókstavum, orðum og setningum.

Tosið við barnið

Um hvussu bókstavur og ljóð hóska saman. Um týdningin av ymiskum orðum. Um bókstavir.

Lurtið

Tá ið barnið tosar og tosa útfrá tí – uttan at rætta barnið, men heldur við at endurtaka rætt.

Spælið spøl

Minnispøl og myndaspøl og onnur spøl stimbra málið og lesiførleikan. Gerið orðakort við nøvnunum av familju og kenningum, yndismati, kelidjórum o.ø. Gerið myndaspøl við orðakortunum.

Lesið hart

Lesið fyri barninum. Latið barnið lesa hart fyri tykkum, hjálpið tí uttan at rætta, men heldur við at endurtaka rætt. Lesið bøkur, t.d. tær sum eru gjørdar til film og berið saman.

Vísið áhuga fyri bókum

Vitjið bókasavnið. Lænið bøkur. Lesið sjálvi. Tosið um bøkur og bløð.

Lesið ymiskt

Lesið teknirøðir, skeltir og lýsingar. Býar/bygdarnøvn, gøtunøvn og handilsnøvn. Tekstin í sjónvarpinum.

Lurtið eftir bókum

Lánið ljóðbøkur á bókasavninum og lurtið, meðan tit t.d. koyra bil ella gera mat.

Skrivið

Minnisseðlar og ynskiseðlar. Innbjóðingar, postkort og brøv. Orð og frágreiðingar á tekningar hjá barninum. Latið barnið sjálvt skriva uttan at rætta, men um barnið spyr um stavseting, so gev barninum rætt svar. Latið barnið skriva ”spæliskriving.” Skrivið familjudagbók við tekningum. Skrivið feriudagbók við myndum, klippum og tekningum. Skrivið matuppskriftir. Latið barnið skriva á teldu. Brúkið knappaborðið at lræa bókstavir við. Hangið stavstalvu á ein sjónligt stað t.d. við borðið í køkinum

Um lesing

<u>Tá ið **tú** lesur fyri barninum:</u>

Peika á orðini, meðan tú lesur, soleiðis at barnið sær orðini, sum tú lesur.
Tosið saman um, hvat bókin er um og tosið um myndirnar.
Greið barninum frá orðum, tað ikki kennir.
Lat barnið finna kendar bókstavir og orð í tekstinum.

Um lesing

<u>Tá ið barnið lesur fyri **tær:**</u>

Les fyri barninum, áðrenn barnið sjálvt skal royna seg.
Um barnið ikki megnar at lesa okkurt orð, les tú so fyri tí, soleiðis at

barnið kann fra víðari.
Tú skalt ikki bóta av ella rætta, um barnið lesur skeivt, bara um feilurin órógvar fatanina.
Tað er týdningarmikið, at tú eggjar og roynir at kveikja hugin hjá barninum at lesa.
Um bókin er ov torfør ella keðilig, so finn eina aðra. Tó royn at tillaga hana til barnið. T.d. við at lesa fyri tí, brúka myndir og greið frá torførum orðum. Tað er ikki gott at skifta bøkur ov nógv.

Ofta eru avvarðandi lyklapersónar, tá ið barnið skal læra at lesa.
Meira tú lesur, betri lesari verður tú.
Tað tekur umleið 5000 tímar at læra at lesa.